## Minni flúgving

Triðja árið á rað var talið á flogførum, sum flúgva ígjøgnum tað íslendska eftirlitsøkið, oman fyri 100.000 í fjør. Talið var 101.504, men tað var eini átta prosent færri enn í 2008, tá 110.366 flogfør flugu ígjøgnum tað íslendska eftirlitsøkið. Við øðrum orðum vóru 278 flogfør í økinum í meðal um samdøgrið. Morgunblaðið skrivar, at flogfør, sum flugu í rutu millum London og Los Angeles, vóru tey, sum vóru oftast í íslendska økinum. Icelandair var tað flogfelagið, sum var best umboðað á eftirlitslistanum, og næst tí komu Lufthansa, British Airways og United Airlines.



## Ísland skal í ES

Ein nýggj fylking, sum hevur til endamáls at virka fyri íslendskum limaskapi í Evropasamveldinum, fer til verka fríggjadagin. Umleið 100 fólk hava arbeitt við at stovna rørsluna, sum hevur fingið heitið „Sterkari Ísland - tjóð millum tjóðir". Jón Steindór Valdimarsson, sum er stjóri í Ídnaðarsamtakinum, er ein av stovnarunum. Hann sigur við blaðið Vísir, at rørslan ætlar at leggja seg eftir at kunna íslendingar um ES og týdningin av møguligum limaskapi. Men rørslan fer eisini at leggja dent á, at tað er fólkið, sum skal taka ta endaligu avgerðina.

# Ringt at missa bankabókina

**Eldri fólk eru hørm um, at banka- og sparikassabøkurnar fara í søguna, tí nú verður torførari at fylgja við, siga tey**

PENGAR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Bankabókin hevur altíð verið nakað serligt, sum fólk høvdu stóra virðing fyri, sigur undirhúslimurin Viljormur Tórsheim, uttan til høgru á myndini. Teir hava onkuntíð verið betur mannaðir í Undirhúsinum enn fyrrapartin, men eina løtu vóru teir mannaðir til nøkur whistspøl*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Um ein góðan mánað fer ikki longur at bera til at fara í peningastovnin við sparikassa- ella bankabókini. Tá verður einki sum eitur longur at føra bankabókina.

Fyrr í mánaðinum samdust allir peningastovnarnir í landinum um, at 1. mars verða bøkurnar avtiknar.

Peningastovnarnir siga, at talið av viðskiftafólki við sparikassa- ella bankabok hevur verið minkandi, men tað fæst ikki at vita frá peningasovnunum, hvussu stórur ella lítil partur av viðskiftafólkunum framvegis hevur bók upp á tann gamla mátan. Tað siga teir seg ikki vita.

Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa metir leysliga, at eini 20 prosent av viðskiftafólkunum framvegis hava bók, men fleiri av bókunum verða sjáldan brúktar. Fleiri fólk, sum hava bók, hava eisini kort til somu konto. Væl størra helvtin av teimum, sum brúka bók, eru yvir 60 ár, og tann parturin er hækkaður ár undan ári.

### Færri og færri bøkur

Peningastovnarnir kunnu ikki noyða fólk til at fara yvir at brúka gjaldskort í staðin fyri bók. Í staðin kunnu tey fólkini fáa kontoavrit og síggja á tí, hvørjar flytingar eru gjørdar. Hesi kontoavrit kosta tó 15 krónur arkið.

Seinastu árini hava peningastovnarnir roynt at fingið fólk at lagt um til kort, og onkur stovnur hevur bara latið fólk yvir 60 ár endurnýggja bókina.

Men fleiri eldri fólk eru sera hørm um at skula av við bankabókina.

Eitt prát í Undirhúsinum í Havn sigur nógv. Afturvið kortspælinum siga menninir sína hugsan.

- Eg haldi, at vit eiga at varðveita bókina. Fáir av okkum hava teldu og slíkt, men eg havi aoutospeons. Eg geri nógvar flytingar um telefonina og plagi so av og á at føra bókina, sigur ein.

Eg havi ein blindan mann, sum eg plagi at fara í bankan fyri, og tá ið eg komi aftur, plagi eg at lesa fyri honum úr bókini, sigur hann.

### Einki at gera

Menninir hava so at siga sligið seg til tols við, at bøkurnar fara.

-Peningastovnarnirrationalisera, og lítið hjálpir, hvat vit siga. Tað hevði kanska hjálpt, um fleiri mótmæltu. Men eg haldi hetta vera eitt slag niðan fyri beltið, sigur ein annar.

### Bankabókin er nakað serligt

- Hetta skal takast í einum søguligum samanhangi. Bankabókin hevur altíð verið nakað serligt, sum fólk fóru væl um og goymdu á einum tryggum stað, og sum tey høvdu virðing fyri, sigur Viljormur Tórsheim, trúgvur gestur í Undirhúsinum.

Ein annar nevnir, at eldri fólk ofta senda til dømis eitt barn í bankan fyri seg at gjalda rokningar og at taka ut, og tá ið bókin kemu aftur, kann viðkomandi síggja, um alt er rætt.

- Sjálvt um fleiri hava kort, vildu vit helst varðveitt bókina. Tú kanst heilsa frá okkum, at vit allir í Undirhúsinum eru ímóti at skula av við bankabókina, siga teir.

# Fleiri vilja byggja í Leirvík

**Býráðið í Eysturkommunu játtaði mánakvøldið fýra umsóknum um byggiloyvi í Leirvík**

HÚSABYGGING
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sjálvt um arbeiðsloysi framvegis er gjørt, tykist hugur tó framvegis vera fyri at seta føt undir egið borð.

- Vit hava nøkur grundstykki leys, sum vit hava boðið út, og mánakvøldið samtyktu vit at játta fýra umsóknum, sigur Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eysturkommunu.

Hann veit at siga, at nakrar umsóknir aftrat verða avgreiddar í næstum.

Jóhan Christiansen heldur, at áhugin fyri at byggja hevur alla tíðina verið, men sum allastaðni í landinum hevur hjá nógvum verið trupult at fáa fígging frá peningastovnunum.



*Byggihugurin er stórur í Leirvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*